## Vilja hava prestin

Sum lið í sparingum ætlar grønlendska landsstýrið at niðurleggja tað grønlendska prestastarvið í Danmark í 2011, men tað hóvar ikki teimum grønlendsku útisetunum. Birthe Metelmann, sum er formaður í høvuðsfelagnum hjá útisetunum, sigur við KNR, at tað er torført at fáa eyga á nakra veruliga grundgeving fyri ætlanini hjá landsstýrinum. Hon vísir á, at prestastarvið í Danmark kostar bara trý prosent av játtanini til grønlendsku kirkjuna. Harafturímóti fær tað ovurstórar avleiðingar, verður starvið niðurlagt, sigur hon.



## Obama umhugsar Keypmannahavn

Barack Obama, forseti, sigur seg nú vera til reiðar at fara á ST-veðurlagsráðstevnuna í Keypmannahavn í næsta mánað, men treytin er, at útlit eru fyri einari avtalu, og at hansara luttøka kann gera mun. -Kenni eg meg sannførdan um, at øll londini leggja álvara í samráðingarnar, at tað ber til at semjast um eina veruliga avtalu, og at mín hjávera kann gera mun, fari eg til Danmarkar, sigur Obama við Reuters-tíðindastovuna. Tað hevur annars ljóðað í seinastuni, at amerikanski forsetin hevði slept ætlanini um at fara á veðurlagsráðstevnuna í Keypmannahavn.




# Taka ikki Fíggjarmálaráðið í álvara

**Felagið fyri Løggildar Grannskoðarar heldur Fíggjarmálaráðið gera gjøldur burturúr sær, tá tað sendur teimum lóg um hvítvasking og fígging av yvirgangi til hoyringar, við freist upp á eina viku. – Vit kunnu ikki taka hetta í álvara, sigur felagið í aftursvari**

LÓGARSMÍÐ
*Rógvi Nybo*
*rogvi@sosialurin.fo*

»Vit skulu siga frá, at vit ikki kunnu taka hetta í álvara, tá tíðarfreistin fyri so rúgvusmiklum tilfari um so týðandi mál er sett til eina viku...«

Soleiðis stendur í parti av svarinum, sum Felagið fyri Løggildar Grannskoðarar hevur givið Fíggjarmálaráðnum aftur, í samband við, at felagið hevur fingið eitt rúgvusmikið lógaruppskot til hoyringar.

Talan er um eitt uppskot um lóg um fyribyrgjandi tiltøk móti at hvítvaska vinning og ímóti at fíggja yvirgang, sum Fíggjarmálaráðið hevur sent út til fleiri partar at gera viðmerkingar til.

Samlaði lógarteksturin, sum feløgini verða biðin um at koma við viðmerkingum til, er omanfyri 400 blaðsíður langur, og hoyrinsfreistin er sett til eina viku.

Jógvan Amonsson, sum svarar vegna felagið fyri Løggildar Grannskoðarar, sigur í svarinum, at »vit skulu vísa á, at vit hvør í sínum lagi hava okkara dagliga starv á vinnuligum fyritøkum. So slíkt arbeiði mugu vit gera ókeypis eftir arbeiðstíð«.

### Ikki fyrstu ferð og ikki av óvart

Men hetta er eftir øllum at døma ikki fyrstu ferð, at Fíggjarmálaráðið heldur hoyringspartar fyri gjøldur.

Vit endurgeva her ein størri part úr svarskrivinum.

»Tað seinastu tíðina hava vit fingið eina øgrynnu av lógaruppskotum, uppskotum til kunngerð v.m. til hoyringar. Har afturat hava vit verið á fundi við m.a. Vinnunevndina hjá løgtinginum.

Tað vísir seg, at líka mikið hvørjar viðmerkingar vit hava, so verða tær ikki tiknar til eftirtektar, hóast tey vit hava tosað við eru samd við okkum. Um tað so snýr seg um vanligar málsligar villur, so verða tær ikki tiknar til eftirtektar.

Tí fyrikemur tað okkum, at vit bert verða biðin um at koma við okkara viðmerkingum, fyri at tað kann standa í tilfarinum til løgtingið, at uppskotið er sent til Felagið fyri Løggildar Grannskoðarar til hoyringar«.

Sostatt er hetta ein álvarsligur trupulleiki, sum Felagið fyri Løggildar Grannskoðarar vil vísa á, og heldur tað, at tað bara virkar sum »stempulmaskina« fyri landsstýrið, soleiðis at tað kann siga, at lógaruppskotið hevur verið til hoyringar hjá viðkomandi pørtum.

### Ikki teir einastu

Lógaruppskotið hevur, sum sagt, verið hjá fleiri pørtum til hoyringar, eitt nú Dátueftirlitinum og Felagnum Peningastovnar.

Dátueftirlitið er meira afturhaldið í sínum aftursvari til Fíggjarmálaráðið, og sigur sínum svari uttan aðrar viðmerkingar, at »Dátueftirlitið hevur ongan møguleika at gera viðmerkingar við so stuttari freist«.

Úr Felagnum Peningastovnar, sum ein annars átti at hildið er tann mest sentrali og viðkomandi parturin í einum so týðandi máli sum lóg um fyribyrgjandi tiltøk móti hvítvaski og fígging av yvirgangi, er tað bert Føroya Banki, sum hevur eitt svar upp á eittans punkt, og tað svarið er lítla hálva síðu langt. Eingin annar peningastovnur hevur nakra viðmerking.

Sostatt er Felagið fyri Løggildar Grannskoðarar ikki teir einastu, sum eru troyttir av at vera stempulmaskina hjá landsstýrinum.

Lógaruppskotið er eisini sent bæði Innlendismálaráðnum, Vinnumálaráðnum og Advokatfelag Føroya, men einki av hesum hevur somikið sum ønt Fíggjarmálaráðnum aftur um uppskotið.

### Vilja ikki leggja navn til humbukk

Felagið fyri Løggildar Grannskoðarar sigur at enda í svarinum hjá sær, teir helst vilja sleppa undan at verða nevndi í samband við hetta uppskotið.

»Sum sagt meina vit ikki, at vit kunnu koma við nøkrum skilagóðum viðmerkingum innan ásettu tíðarfreistina. Tá vit meina, at hetta ikki er gjørt í álvara, vilja vit heita á fíggjarmálaráðið um ikki at nevna, at hetta er sent okkum til hoyringar«.

Sostatt eru teir ikki einast troyttir av at vera stempulmaskina hjá landsstýrinum og nýta tíð og orku upp á at gera viðmerkingar, ið onga ávirkan fáa, men vilja teir treyðugt leggja navn til at vera viðvirkandi partur í lógarsmínum.

Lógaruppskotið hjá Fíggjarmálaráðnum, um at seta í gildi »lov om forebyggende foranstaltninger mod hvidvask af udbytte og finansiering af terrorisme«, er lagt fram fyri løgtinginum, og skal til 1. viðgerð hósdagin.

